Fíggjarleiðari

Av tí at okkara fíggjarleiðari søkir nýggjar avbjóðingar, verður søkt eftir nýggjum fíggjarleiðara til Kirkjuligu Heimamissiónina.

Vit vænta, at tú:

- hevur skil fyri bókhaldi og roknskapi
- ert virkisfúsur og skipaður
- hevur leiðara- og samstarvsevni
- tekur undir við tí, sum Heimamissiónin stendur fyri
- hevur neyðugan teldukunnleika

Tú hevur ábyrgd fyri:

- dagligu fíggjarligu leiðsluni og umsitingini av Heimamissiónini við greinum og fyritøkum
- at samskipa og standa fyri innsavningum, føstum gevarum, o.ø.
- at gera og fylgja upp fíggjarætlanum
- skrivstovuni í Nesvík

Vit bjóða tær eitt spennandi starv, eitt gott arbeiðsumhvørvi og góðar arbeiðstreytir. Løn sambart avtalu. Ferðaútreiðslur eftir galdandi skipan.

Umsókn við prógvum og viðmælum skal sendast til Kirkjuligu Heimamissiónina, 437 Nesvík, viðm. Fíggjarleiðari.
Umsóknarfreistin er 28. mai 2004

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:
Vagn Foldbo, aðalskrivara
tlf. 47 00 00, fax 47 00 01
t-post: vf@mission.fo

Kirkjuliga Heimamissiónin
FO-437 Nesvík. www.mission.fo , hm@mission.fo
Kirkjuliga Heimamissiónin er luthersk-evangelisk rørsla innan fólkakirkjuna, ið virkar fyri at breiða út gleðiboðskapin um Jesus Krist og menna felagsskap teirra trúgvandi á landi og sjógvi, heima og úti.

Nýggj klaksvíkarleið er byrjað

Koyrt verður úr Havnini
mánadag, mikudag og fríggjadag

Vøra verður heintað til kl. 11.00 í Havnini.

vørur kunnu eisini takast við á vegnum norður

Koyrt verður hurð til hurð

Klaksvíkarleiðin
Lágarvegur 22
100 Tórshavn
Tel. 505191

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Barnaansingin
Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar dagrøktarskipanina, dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

Býlingshúsið á Norðasta Horni
Í býlingshúsinum ganga 49 børn. Stovnurin er skipaður við tveimur barnagarðsstovum og einari vøggustovu. Í stovninum eru 1[illegible] starvsfólk.

Vøggustovan og barnagarðurin við Velbastaðvegin
Á stovninum ganga 101 børn. Stovnurin er skipaður við trimum barnagarðsstovum við 8[illegible] børnum í hvørjari og fyri vøggustovum við 10 børnum í hvørjari.

www.torshavn.fo

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

Býlingshúsið à Norðasta Horni eftir:
- einum pedagogi til Hornastovan í vøggustovuni at byrja 1. jun eftir nærri avtalu.

Leiðari: Óli Midjord, tlf. 310905 / 310906
Granagøta 5
FO-100 Tórshavn

Barnagarðurin við Velbastaðvegin eftir:
- eftir tveimum pedagogum at arbeiða 35 tímar um vikuna í vøg at byrja 4. august 2004.
- einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna í vøggustovun [illegible] august 2004.
- tveimum pedagogum at arbeiða 40 tímar um vikuna á barnag byrja 4. august 2004.

Leiðari: Mona R. Moh[illegible] tlf. 31 [illegible]373
Velbastaðvegur 41
FO-100 Tórshavn

Setanarviðurskifti
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedago Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meiri fæst at vita
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina samskipara, tlf. 31 51 60.

Umsókn
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og roynd stovninum í hendi í seinasta lagi mikudagin 26. mai 2004.

JBJ BYGGING

Har tykkara ynski verða sett í hásætið

Alt innan timburarbeiði og stoyping verður gjørt skjótt og bíligt, um alt landið.

- Sethús
- Umvælingar
- Stoyping av grundum v.m.

Óbindandi tilboð verða givin

Eisini umboða vit nýggju amerikansku bjálkahúsini.
sí www.amerlog.dk

JBJ BYGGING
Tel 213181
Tel 213182
Tel 213183
Oman Stóragarð 9
jbj@email.fo

VARPIÐ

Skráir og ummælir
16 síður
Hvønn fríggjadag

SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá TV • Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ DK 4 • TV 1000 • TV3 dk • Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel Euro Sport • MTV • National Geographic • TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

Skjóttgangandi bátur av slagnum TG 6400

- 22' fót glasfiber við rúmligari cabinu og hevur dekk aftan og framman
- 105 hk volvo penta turbo diesel
- topfartur er 32 míl
- er útstýrdur við Ekkolodd, Radara, GPS pláttara & VHF, stereoanlegg
- í fínasta standið

Sosialurin 741800

TIL SØLU við vogni
Ring tlf. 217166

Skrivstovulærlingur søkist

Kundi tú hugsað tær eina framtíð innan skrivstovuyrkið?

Vit hava brúk fyri einum skrivstovulærlingi (m/k).

Vit kunnu bjóða tær:
- Eitt avbjóðandi starv í eini spennandi vinnu, har tú gerst partur av einum góðum toymi, og har arbeiðsandin er av teim bestu
- Tryggar arbeiðsumstøður
- Góðar møguleikar fyri persónligari menning

Tú mást hava HH ella FHS prógv.

Lærutíðin er ávíkavist 2 ella 3 ár.

Tú mást vera fryntlig/-ur, samstarvsáhugað/-ur, ágrýtin og til reiðar at taka við nýggjum lærdómi og ikki vera bangin fyri at taka eina hjálpandi hond í tá á stendur. Til tíðir kann vera sera nógv at gera.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til okkara og tosa við Jan Danielsen, stjóra.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn saman við prógvum og ummælum í seinasta lagi 11. mai 2004.

pf Klement Petersen

Tlf. +298 447560 · Fax +298 448460
e-mail: jandan@klementpetersen.fo

Pf. Klement Petersen er ein fyritøka í støðugari menning, sum í løtuni hevur 9 fólk í starvi. Vit selja í høvuðsheitum tilfar til byggivinnuna og til hús, so sum køkar, hvítvørur, tak, gólv o.m.a.

Klaksvíkar Sjómansskúli

– ein virkin skúli

Í august 2004 byrja hesi skeið á Klaksvíkar Sjómansskúla.

Sjóvinnuflokkur
Við hesum skeiði fæst atgongd til framhaldandi lestur til skipara, um tygum eisini hava ta neyðugu siglingartíðina. Nærri upplýsingar hesum viðvíkjandi fáast við at venda sær til skúlan.

Møguleiki verður eisini at taka dugnaskaparskeið í sigling, ið gevur rætt til at føra skip upp til 100 tons út á 30 fjóðringar úr landi.

Í lærutíðini verða skeið tikin innan trygd og fyrstuhjálp.

Skeiðið varar 20 vikur. Tað eru ongar upptøkutreytir til at sleppa inn í sjóvinnuflokkin. Fyri tey, sum seinni ætla víðari, er tað ein stórur fyrimunur at hava gingið í sjóvinnuflokkinum áðrenn, tí her verður grundarlagið til fleiri týðandi lærugreinar lagt. Tvey pláss eru eftir til sjóvinnuflokkin.

Skipskokkaskeið
Útbúgvingin gevur øktan førleika at virka sum skipskokkur á føroyskum fiskiskipi.

Kokkaútbúgvingin leggur m.a. dent á, at næmingar læra føðslulæru og reinføri, at proviantera, matgera, baka og borðreiða.

Í lærutíðini verða skeið tikin innan trygd og fyrstuhjálp.

Skeiðið varar í 20 vikur. Skeiðið, ið byrjar í august 2004, er fullteknað, men nýtt skeið byrjar aftur í januar 2005. Har eru nøkur pláss eftir.

Skiparar
Nýtt skeið til skiparar byrjar í august 2004. Til hetta skeiðið eru bert nøkur heilt fá pláss eftir.

Útbúgvingin til skipara varar í 1 1/2 ár. Upptøkutreytir til skiparar er treytað at viðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans í lærugreinunum føroyskt, danskt, enskt, rokning/støddfrøði, alis/evnafrøði við prótvali í minsta lagi 6 ella javnmett hægri prógv. Ella hevur gingið á sjóvinnuskúla og staðið dugnaskaparskeið í sigling.

Umsóknarblað
Umsóknarbløð fáast við at ringja á tel. 456128. Síðsta freist at tekna seg er 20. mai 2004.

Skúlastýrisval

Felagsskúlin á Oyrarbakka

Vallistin til skúlastýrisvalið 25. mai 2004 liggur frammi á skrivstovu skúlans og kommunuskrivstovunum í økinum.

Fólk, sum ikki eru á vallistanum, og sum hava valrætt og valbæri, skulu venda sær til skúlan í seinasta lagi 18. mai við undirskrivaðari váttan fyri at koma á vallistan.

Uppstillingarfundur verður í Felagsskúlanum mikukvøldið 12. mai kl. 20 og ikki, sum lýst í brævi til foreldrini.

Valnevndin f. Felagsskúlan

Sethús í Vestmanna til sølu

Eini eldri sethús á Bakkanum í Vestmanna, matr.nr. 81, verða hervið lýst til sølu, um hóskandi boð fæst.

Húsini eru umleið 41 m² í trimum hæddum, 2 innrættaðar hæddir og kjallari, grundøkið er 233 m².

Í ovastu hæddini eru 2 kømur, og eitt stórt rúm sum kann nýtast til stovu, ella kømur.

Í miðhæddini er køkur/stova, 1 kamar, wc/bað og gongd.

Húsini eru bygd umleið 1920, og eru umvæld innan og partvíst uttan, og eru sum nýggj innan, m.a. er nýggjur køkur, nýggj gólv, nýggj elinnlegging, nýggj oljufýring og radiatorskipan, og eisini eru húsini plátaði av nýggjum innan, og isoleraði.

Eisini eru øll vindeygu skift (minus kjallari) tey síðstu 10 árini, og takið er gott og partvíst nýtt.

Húsini eru sera hugnalig, og liggja í sera hugnaligum, veðurgóðum og barnavinarligum umhvørvið.

Áhugað kunnu ringja á tlf. 424792 eftir kl. 17.00

Bilur til sølu

Peugeot 406 HDi

Árg.: 1999

Til sølu fyri hægsta boð omanfyri kr. 100.000,-
Moguliga kann biligari bilur ganga inn í keypið

Tel. 22 20 18 / 22 75 88

Starvsfólk

Søkt verður eftir fólki til viðlíkahald av báðum kirkjugørðunum í Vestmanna, so sum at sláa grasið og lúka millum gravirnar.

Byrjast skal beinanvegin.

Áhugað m/k kunnu ringja til tlf. 214107.

Kirkjugarðsnevndin